# Fólk á ferð

STRANDFARASKIP LANDSINS

**STRANDFERÐSLAN**
HÁTÍÐARHELT 100 ÁRA DAG

*VARÐVEITA TÆR*
**UPPRUNALIGU FØROYAR**

TÁ VEGURIN ER **EITT SKIP**

*FLEIRI SKIP MUGU*
**ENDURNÝGGJAST**




ÓKEYPIS – **HEYST 2017**

03 STRANDFERÐSLAN HÁTÍÐARHELT 100 ÁRA DAG

06 VARÐVEITA TÆR UPPRUNALIGU FØROYAR

10 ÚTOYGGJARNAR BLØÐA – MIÐSTAÐARØKIÐ VEKSUR

14 TÁ VEGURIN ER EITT SKIP

18 FRAMGONGD OG AVBJÓÐINGAR Í FERÐAVINNUNI

20 FLEIRI SKIP MUGU ENDURNÝGGJAST

26 HALDA KOYRIR BUSS HJÁ BYGALEIÐUM

32 GALAXY ROYNDIST EFTIR UMSTØÐUNUM VÆL

34 FERÐSLUKORT

37 THE PUBLIC TRANSPORT COMPANY OF THE FAROE ISLANDS

38 BARNASÍÐAN

STRANDFARASKIP LANDSINS

**FÓLK Á FERÐ**

**ÚTGEVARI**
Strandfaraskip Landsins

**ÁBYRGD**
Hilmar Eliasen, stjóri

**SKRIVAÐ**
Eyðhild Jacobsen
Uni Arge

**UPPSETING OG SAMSKIPAN**
Sendistovan

**PRENTUMSITING**
Sendistovan

**FORSÍÐUMYND**
Sosialurin

**ONNUR MYNDAFÓLK**
Ólavur Frederiksen, Finnur Justinussen,
Sosialurin, Strandferðslan o.o.




# Útoyggjar á vegamóti

Í mai í ár hátíðarhelt Strandferðslan, at 100 eru liðin, síðan landið fór undir strandfarasigling. Vit fegnast um, at 4–500 fólk nýttu høvið at støkka inn á gólvið í SALT og hátíðarhalda dagin saman við okkum.

Dagurin í SALT var bæði hátíðarligur og upplýsandi. Í nýggja mentanarskálanum var stór framsýning við myndum og tekstum um bátar og skip, sum hava siglt millum oyggjarnar og millum Føroyar og umheimin í meira enn heila øld.

Hátíðarhaldið varð eisini skipað sum ein ráðstevna, har serkøn fólk bóru fram síni sjónarmið um búseting, ferðavinnu og samferðslu í Føroyum. Nógv áhugavert kom fram, sum lesast kann um í blaðnum hesaferð.

Hans Pauli Strøm, sosiologur, vísti á, at útjaðarin bløðir, hvat fólkatali viðvíkur. Í 1950 búðu 1.077 fólk á smæstu oyggjunum, men hetta talið er nú komið niður á 288. Óluva Zachariassen í Hesti vísti á, hvørjar avbjóðingar eru serliga í Hesti.

Súsanna Sørensen á Visit Faroe Islands vísti á framgongdina og avbjóðingarnar í ferðavinnuni. Hon nevndi eisini, hvat Strandferðslan kann gera betri. Hesi hjartasuff hava vit noterað okkum, og vit ætla at bøta um tænastuna, har vit kunnu.

Greitt er tó, at vit betur høvdu fingið manøvrerað, um vit høvdu ein bát aftrat, sum t.d. kundi siglt morguntúr úr Hesti og eisini kundi avloyst skip, sum fara í dokk. Strandferðslan hevur roynt at ognað sær Jósup, sum siglir á Mykines-leiðini, men hevur enn ikki fingið politiska undirtøku fyri tí.

Strandferðslan hevur avbjóðingar av, at flotin er ov avmarkaður, ikki bara í tali, men eisini í dygd, eins og frágreiðingin hjá Knud E. Hansen um flotan vísir. Meira kann lesast um hana í blaðnum.

Vit fara sjálvandi framhaldandi at arbeiða fyri at loysa okkara avbjóðingar. Hetta má gerast fyri at tryggja tilveruna á útoyggj, nøkta tørvin í sambandi við, at ferðavinnan veksur, og kunna avloysa skip, sum av ymiskum ávum mugu takast úr rakstri.

*Hilmar Eliasen, stjóri*
*Strandfaraskip Landsins*



# Strandferðslan hátíðarhelt **100 ára dagin**

Eini 500 fólk vitjaðu í SALT á Drelnesi, tá Strandferðslan 19. mai í ár beyð almenninginum á gátt at hátíðarhalda, at 100 ár vóru liðin, síðan landið tók yvir Smyril frá Mortensens-monnunum. Hátíðarhaldið varð skipað sum ein upplýsandi ráðstevna við framløgum, kjaki og hugleiðingum












*Stór framsýning hekk uppi í SALT, sum lýsti søguna hjá innanoyggjasiglingini við ferðafólki og millumlandasiglingini*



Dagurin byrjaði við, at Smyril flaggskrýddur kom inn eftir Trongisvágsfirði av Havnini við gestum norðanífrá. Hann heilsaði fyrst uppá á Drelnesi og legði so at á Krambatanga, haðani gestirnir vórðu koyrdir í bussum yvir í flaggskrýddu saltsiloina. Í SALT hekk stór framsýning um samferðsluna í Føroyum uppi. Hon lýsti siglingina millum oyggjarnar og millumlandasiglingina. Tvøroyrar Hornorkestur spældi, og gestirnir fingu føðingardagskøku og kaffi.

Fyrri partur av tiltakinum var ein upplýsandi ráðstevna, har fimm fólk løgdu fram um støðuna á samferðsluøkinum, m.a. við at atliti at búsetingarmynstri og ferðavinnumenning. Tey, sum høvdu orðið, vóru Hilmar Eliasen, stjóri á Strandferðsluni, Henrik Old, landsstýrismaður við samferðslumálum, Hans Pauli Strøm, hagfrøðingur, Súsanna Sørensen, Visit Faroe Islands, og Óluva Zachariassen, tíðindakvinna búsett í Hesti. Aftaná var kjak, sum Uni Arge skipaði fyri.

Seinni partur av tiltakinum var halgaður løttum hugleiðingum um samferðslu fyrr og nú. Jóannes Eidesgaard, fyrrverandi løgmaður, segði frá minnum um at sigla við gomlu skipunum um Suðuroyarfjørð og bar eisini fram eitt ynski um, at Strandferðslan fer aftur undir uttanlandssigling. Robert McBirnie mintist í sínum hugleiðingum manga baldruta ferð og segði frá søgum, ið fingu smílini fram hjá áhoyrarunum.

Ólavur Rasmussen, stigtakari til SALT, greiddi síðan frá arbeiðinum at gera verkætlanina til veruleika, og Eyðun Ásason sang. Hátíðarhaldið byrjaði kl. 12.30 og endaði kl. 18.00. Kl. 18.30 fór Smyril aftur til Havnar við gestunum norðaneftir. Framsýningin um samferðsluna hekk uppi í tríggjar vikur og verður væntandi eisini at síggja aðrastaðni í landinum. Eisini verða greinir skrivaðar í „Fólk á ferð“ seinni við tilfari úr framsýningini.



# Varðveita tær **upprunaligu** Føroyar

Í dag krevja fólk, at skip og bussar skulu sigla og koyra stundisliga og so ofta sum gjørligt. Men stundum má fasta ferðaætlanin hjá Strandferðsluni víkja, tí veðrið argar. Størstu avbjóðingarnar eru á útoyggj. Kortini eru tær millum best umtóktu ferðamál, tí tær bjóða upprunaligt bygdalív. Strandferðslan er við til at varðveita tær upprunaligu Føroyar, segði Hilmar Eliasen, stjóri, m.a. á 100 ára haldinum í mai





Vanliga hoyrist ikki so nógv til virksemið hjá Strandferðsluni, tí reglan heldur enn undantakið er, at skip og bussar sigla og koyra, sum tey skulu. Men eru avbjóðingar, ið elva til seinkingar ella avlýsingar, verður hetta gjølla umrøtt í fjølmiðlunum. Hetta vísir bara, at tað, sum Strandferðslan ger, hevur alstóran týdning og viðkemur mongum fólkum í Føroyum.

M.a. hetta staðfesti Hilmar Eliasen, stjóri á Strandferðsluni, á 100 ára haldinum hjá Strandferðsluni í mai, tá 4–500 fólk vóru komin saman í SALT á Drelnesi at síggja framsýning um innlands- og uttanlandssigling í Føroyum og hoyra framløgur um samferðslu, ferðavinnu og búsetingarmynstur í oyggjunum.

Við teirri tænastu, Strandferðslan veitir, hevur hon uppbygt ein tørv á flutningi, sum fólk vænta verður nøktaður hvønn einasta dag. Men koma veður og vindur í vegin, mugu sigling og koyring viðhvørt avlýsast, tí atlit mugu altíð takast til trygdina. Hesar eru treytirnar í einum oyggjalandi, har veðrið ræður sær sjálvum, segði hann.

## SKUNDMIKLA SAMFELAGIÐ

Hilmar Eliasen leitaði aftur í tíðina og hugleiddi um, at fólk fyrr góðtóku uttan stórvegis mótmælir, at var veðrið ikki til vildar, bar ikki til at sigla ella koyra.

Í dagsins samfelag eru fólk meira krevjandi. Øll eru von við nú, at alt skal ganga skjótt, og at alt er stundisligt. Koma forðingar í vegin, uppliva tey flestu hetta sum óneyðugar seinkingar, og tí gera fólk vart við sína ónøgd – í fjølmiðlum og á sosialum miðlum.

„Í einum samfelag, sum vil vera effektivt, er hetta væl skiljandi. Sjálvandi skal ferðslan innanoyggja glíða væl, so dagliga lívið á stórum sum smáum plássum kann uppihaldast. Men avmarkingar eru viðhvørt. Bussarnir kunnu ikki koyra, um teir eru í vanda fyri at koppa. Skipini kunnu ikki sigla, um tey ikki sleppa at kai. Og so má bíðast eftir betri veðri," segði Hilmar Eliasen.

## ØÐRVÍSI VIÐ ÚTLENDINGUM

Hann umrøddi eisini andsøgnina í, at tá talan er um útlendsk ferðafólk, er ónøgdin ikki so stór, um seinkingar og avlýsingar koma fyri. Útlendsku ferðafólkini koma til landið at uppliva vakurleikan, friðin og náttúruna, og óvæntaðar støður uppliva tey ofta sum sjarmerandi.

„Ein andsøgn kann sigast at vera í, hvussu effektivt vit í Føroyum vænta, at samfelagið verður rikið, og hvussu vit so marknaðarføra landið uttanlands. Visit Faroe Islands marknaðarførir Føroyar sum eitt óforútsigiligt og ótamt



»Alt tað, sum eyðkennir okkum, er tað, sum ferðafólk koma higar at síggja



*Hilmar Eliasen, stjóri á Strandferðsluni*

ferðamál. Øll tann óvissan og øll tey brádligu skiftini, sum náttúran hevur við sær, er okkara sterkasta amboð í marknaðarføringini. Á ein hátt ber til at siga, at vit marknaðarføra als ikki tær modernaðu og effektivu Føroyar – vit marknaðarføra tær upprunaligu Føroyar," segði Hilmar Eliasen.

## SAMBANDIÐ VIÐ UPPRUNAN

Hann vísti á, at tær upprunaligu Føroyar eru útjaðarin. Tær eru tann lítla bygdin á tí lítlu oynni, sum hevur avbjóðandi ferðasamband, og sum stríðist við minkandi fólkatal. Tær upprunaligu Føroyar síggjast í Svínoy, har seyður gongur á vegnum og undrandi hyggur at tí fremmanda ferðafólkinum, sum tekur myndir av teirri sjáldsomu sjónini.

Tær upprunaligu Føroyar eru lendingarnar á Kirkju og í Hattarvík, har manningin heysar vøruna í land, meðan Ritan vaggar í sjónum. Tær eru eisini gongutúrarnir í Hesti, har ferðafólkini hoyra fuglarnar láta fjart uppi á oynni ella njóta trøllsliga vakurleikan inni í Klæmintsgjógv.

Tær ótamdu Føroyar eru okkara grundleggjandi nationali identitetur, staðfesti hann. Alt tað, sum eyðkennir okkum, er tað, sum ferðafólk koma higar at síggja.

„Strandferðslan flytur flestu útlendsku ferðafólkini til stóru upplivingarnar kring landið. Í veruleikanum kann sigast, at virksemið hjá okkum er við til at varðveita tær upprunaligu Føroyar. Vit gera atkomuna og búsetingina møguliga. At summi sambond kundu verið betri, hoyra vit meir enn so. Men nógv er longu á eini leið, tori eg at siga," segði Hilmar Eliasen.

Hann endaði við at spyrja, hvørjar Føroyar føroyingar ynskja sær.

„Skulu vit hava einar miðsavnaðar Føroyar og lata smáplássini falla, ella skulu vit varðveita lívið á smærru plássunum, hóast umstøðurnar har eru truplar, tí vit vilja varðveita tær upprunaligu Føroyar? Eg vænti, at svarið er, at tær upprunaligu Føroyar mugu ikki hvørva," segði hann.

# Útoyggjarnar bløða – miðstaðarøkið veksur

Hagtølini yvir gongdina í fólkatalinum kring Føroyar vísa eina dapra mynd á útoyggj. Í 1950 búðu tilsamans 1.077 fólk í Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Hesti, Koltri, Mykinesi, Skúvoy og Stóru Dímun. Í 2000 var talið komið niður á 384, og nú búgva 228 fólk á hesum oyggjum. Samstundis er vøksturin ovurstórur í høvuðsstaðarøkinum

Okkurt bendir á, at sama hvussu gott ferðasamband er til smæstu plássini í Føroyum, so minkar fólkatalið. Hetta vísa ið hvussu er hagtølini, sum Hans Pauli Strøm, sosilogur, legði fram á 100 ára haldinum hjá Strandferðsluni í mai í ár. Í 70 ár er talið á íbúgvum á útoyggj minkað niður í ein fimting av tí, tað var.

Í 1950 búðu 200 fólk í Fugloy. Har er talið nú 45. Í Svínoy búðu 174 fólk. Nú eru tey 29. Soleiðis er gongdin á øllum útoyggjum. Á Kalsoynni vóru 312 fólk í 1950 samanborið við 76 nú. Í Mykinesi vóru 141 samanborið við 14 í dag. Í Skúvoy búgva nú 32 fólk. Tey vóru 144 beint eftir kríggið.

Væl kent er, at fólkatalið í mongum bygdum fór at minka, tí fólk fluttu burtur í stórum tali. Menn fóru at sigla ella tóku upp lønt arbeiði á stóru plássunum, og fleiri fóru eisini undir lestur. Stundum fluttu heilar familjur, um ein í familjuni skuldi avstað, og í flestu førum kom ongin aftur. Hetta sæst dyggiliga aftur á útoyggj.

## AÐRAR OYGGJAR

Hans Pauli Strøm hevði eisini hugt at, hvussu stendur til á teimum sonevndu hjáoyggjunum, Kunoy, Viðoy og Nólsoy. Á Viðoynni er fólkatalið vaksið úr 353 í 1950 upp í 588, men í Nólsoy er tað minkað úr 316 niður í 218, hóast oyggin liggur beint við Havnina. Í Kunoy er fólkatalið eisini minkað – úr 182 fólkum í 1950 niður í 136 í dag.

Verður hugt av teimum stóru oyggjunum, stingur ein seg burturúr sum tann fólkaríkasta. Heili 23.511 fólk búgva á Streymoynni nú samanborið við 9.313 í 1950. Nógv tey flestu búgva í høvuðsstaðnum. Bara frá 1. apríl 2016 til 1. apríl 2017 vaks fólkatalið í Tórshavnar kommunu við 400. Næststørsta vøksturin hevði Sunda kommuna við 51 fólkum.

Tær av størstu oyggjunum, sum hava størstu avbjóðingarnar, eru Suðuroyggin og Sandoyggin. Fólkatalið í Suðuroy var 6.268 í 1950. Í dag er tað 4.611. Í Sandoynni búðu 1.561 fólk í 1950 og í dag 1.245. Vøkstur er annars í Vágum, á Borðoynni og serliga í Eysturoynni, har 6.988 fólk búðu í 1950. Í dag búgva 11.069 har.





## JAVNARI FYRR

Hans Pauli Strøm fór eisini longur aftur enn 1950 at kanna, hvussu lutfallið millum ymsu økini var fyrr í tíðini. Áhugavert er, at í 1769 búðu 954 fólk í Suðurtreymoy, 683 fólk í Suðuroynni og 585 fólk í Norðoyggjum. Í Eysturoynni vóru 1.108 fólk. Tilsamans var fólkatalið í Føroyum hetta árið 4.771.

Í 1834 var fólkatalið í Føroyum 6.928. Nú búðu 1.255 fólk í Suðurstreymoy, 1.055 fólk í Suðuroy og 862 í Norðoyggjum. Í Eysturoynni búðu 1.648 fólk. Í 1880, tá fiskivinnan so smátt tók dik á seg, vóru 1.657 fólk í Suðurstreymoy, 1.974 fólk í Suðuroy og 1.397 fólk í Norðoyggjum. Í Eysturoynni vóru 2.712 fólk. Tilsamans búðu 11.220 fólk í Føroyum tá.

Fiskivinnan var av álvara farin at blóma í 1921. Tá búðu 21.352 fólk í Føroyum. Av teimum búðu 4.863 í Suðuroynni, sum var meira enn fólkatalið har í dag. Í Suðurstreymoy búðu 3.390 fólk, í Norðoyggjum 2.459 og í Eysturoynni 4.878 fólk. Her sæst, at Suðuroyggin og Eysturoyggin vóru fólkaríkari enn høvuðsstaðurin.

Í 1950 var fólkatalið í Føroyum 31.781. Tá var á leið sama fólkatal í Suðurstreymoy, Eysturoynni og Suðuroynni, 6.–7.000 fólk í hvørjum stað. Men í 1985 vóru 45.348 fólk í Føroyum, og nú vóru 15.298 fólk í Suðurstreymoy, 5.881 í Suðuroy og 9.979 í Eysturoynni. Í Norðoyggjum vóru 5.914 fólk.

## BINDA ALT SAMAN

Greitt er, at tað er serliga eftir seinna heimsbardaga, at Havnin veksur, og hon heldur bara fram at vaksa. Vøksturin er so stórur, at tá um útbyggingar av samferðslukervinum





*Hans Pauli Strøm, sosiologur á Hagstovu Føroya*

ræður, hevur fremsta málið verið at binda restina av Føroyum saman við miðstaðarøkinum, og hetta arbeiðið gongur skjótt.

Í 2002 varð Vágatunnilin tikin í nýtslu, og í 2005 kom Norðoyatunnilin. Arbeiðið upp á Eysturoyartunnilin er í gongd, og tá hann er avgreiddur, skal Sandoyartunnilin gerast. Áðrenn hetta arbeiðið er byrjað, hevur Landsverk skotið upp, at ein tunnil til Suðuroyar skal gerast í tveimum – umvegis Skúvoynna. Tá tað er gjørt, eru 99 prosent av fólkinum bundin saman.

## FÓLKATAL Í FØROYUM

| Ár | Fólk |
|---|---|
| 1769 | 4.771 |
| 1834 | 6.928 |
| 1880 | 11.220 |
| 1921 | 21.352 |
| 1950 | 31.781 |
| 1985 | 45.348 |
| 2017 | 50.150 |



# Tá **vegurin** er eitt **skip**

Ein av útoyggjunum, sum hevur avbjóðingar við minkandi fólkatali, er Hestur. Álitið hjá oynni er sjóvegis sambandið. Umráðandi er, at tað er so gott, at fólk bæði kunnu búgva fast í oynni og arbeiða, ganga í skúla og brúka frítíðartilboð í meginøkinum, segði Óluva Zachariassen, tíðindakvinna úr Hesti, í sambandi við 100 ára haldið hjá Strandferðsluni



Óluva Zachariassen er ættað úr Hesti og flutti útaftur í oynna fyri tveimum árum síðan, tá hon tók við einum festi har. Hóast festið ikki er nakar harragarður, sum hon tók til, so er gott at vera í Hesti. Men hon kundi ynskt sær, at fortreytirnar at búgva har kundu verið betri.

Strandferðslan gjørdi í november 2016 broytingar í ferðaætlanini á Hest-leiðini. Ein broyting var, at túrurin kl. 07.05 á morgni varð tikin burtur, tí ongin brúkti hann. Í staðin fór Teistin at sigla úr Hesti kl. 09.00, kl. 14.50 og so aftur kl. 19.30. Óluva Zachariassen var ikki nøgd við hesa broyting, tí broytingin hóskar ikki til fólk, sum skulu til arbeiðis og í skúla, segði hon.

„Fyrr slapp eg av oynni kl. 07.05 og heimaftur kl. 18.25, men við broytingini hóskar siglingin ikki til fólk, sum skulu í skúla og til arbeiðis í Havn. Hetta hevur við sær, at fólk fáa ikki búð í oynni, og tilknýtið til oynna hvørvur. Við minkandi tilknýti minka eisini møguleikarnir fyri at læra um alt, sum hoyrir bygdarlívinum og náttúruni til," segði Óluvá Zachariassen.

Við lógini um ferðafólkaflutning í hondini vísti hon á, at landið hevur skyldu til at skipa fyri nøktandi sjóvegis fólkaflutningi, eins og skrivað stendur. Í lógini stendur ikki, hvat hetta merkir, men Óluva vísti sjálv á, at nøktandi sjógvegis fólkaflutningur er, tá tú rættiliga ótarnað kanst taka tær av týdningarmestu viðurskiftunum í lívinum – familju, arbeiði, skúla og frítíðarítrivum.

## »Neyðugt er at nágreina skylduna til fólkaflutning

Hon vísti á, at hóast fólkatalið er nógv minkað í Hesti, hava mong fólk tilknýti til oynna, m.a. sum parttíðarbúsett. Umráðandi er, at sambandið við oynna bæði verður hildið uppi vegna tey fastbúsettu, tey partíðarbúsettu og tey, sum kundu hugsað sær at sett búgv har og samstundis virkað í meginøkinum til arbeiðis ella í skúla.

„Neyðugt er at nágreina skylduna til fólkaflutning, so tey ungu kunnu skapa lív á útoyggj, og útoyggjafólk verða tryggjað ímóti tilvildarligum avgerðum, sum skerja túratalið heilt munandi. Fyri hvørjar 10 mió. kr., sum fara í tunlar, gevið so útoyggjafólki ein túr aftrat. Minst til, at ferjan er vegurin til arbeiðis og í skúla," segði Óluva Zachariassen.







*Óluva Zachariassen, tíðindakvinna í Hesti*

# Framgongd og avbjóðingar í ferðavinnuni

Visit Faroe Islands hevur sum mál, at ferðavinnan skal umseta fyri eina milliard krónur í 2020. Væl gongst at skapa vøkstur, men avbjóðingar eru eisini. Smæstu plássini eru ikki før fyri at taka ímóti ov mongum ferðafólkum, og avmarkað tal á seingjarplássum er í landinum, segði Súsanna Sørensen á Visit Faroe Islands á 100 ára degnum hjá Strandferðsluni



Ferðavinnan skal gerast nýggj grundleggjandi vinna í landsbúskapinum, og hon skal mennast á burðardyggan hátt – við fyriliti fyri føroyska fólkinum, umhvørvinum og búskapinum.

Hetta er høvuðsmálið hjá Visit Faroe Islands, sum við tvífaldaðari játtan á løgtingsfíggjarlógini legði til brots at marknaðarføra Føroyar fyri trimum árum síðan til tess at tvífalda umsetningin í vinnuni úr 500 mió. kr. upp í eina milliard í 2020.

Átøkini hjá Visit Faroe Islands hava riggað væl. Alsamt fleiri útlendskir fjølmiðlar vísa á Føroyar sum ferðamál, fleiri ferðafólk koma higar, og umsetingurin er øktur upp í 665 mió. kr. Ferðavinnan stendur nú fyri 7,3 prosentum av útflutninginum, og í vinnuni eru 470 ársverk.

## EISINI AVBJÓÐINGAR

Men samstundis sum vøksturin tekur dik á seg, eru avbjóðingar í vinnuni. Neyv samskipan krevst innlendis, tá ferðafólkatalið veksur, og neyðugt er, at bæði land, kommunur og vinnan samstarva. Eisini er neyðugt at verja náttúruna, økja talið á seingjarplássum og menna fleiri tilboð til ferðafólkini.

Haraftrat er ein avbjóðing, at smæstu plássini, sum eru tey mest spennandi at vitja, eru ikki før fyri at taka ímóti alt ov mongum ferðafólkum. Í m.a. Mykinesi hevur hetta víst seg, og í Saksun hevur heimafólkið verið ónøgt við, at ferðafólk gera ov nógv um seg.

Á 100 ára haldinum hjá Strandferðsluni vísti Súsanna Sørensen á, at ferðavinnan í mangar mátar er ein sólskinssøga. Málsetningarnir halda, og áhugin fyri Føroyum økist. Men skal málið um at tvífalda umsetningin í 2020 røkkast, krevst at fremja átøk, ið tryggja, at menningin er burðardygg.

## SPJAÐA VITJANIRNAR

Ferðavinnan er enn ikki nøkur stórvinna samanborið við fiskivinnuna og alivinnuna, tí hon stendur bara fyri 1,7 prosentum av BTÚ. Men stigvíst skapar hon búskaparvøkstur, øktar skattainntøkur, fjøltáttar arbeiðsmarknaðin, skapar fleiri arbeiðspláss kring landið og styrkir samleikan, stoltleikan og framtíðarvónirnar í Føroyum.

Ein stór avbjóðing er, at flestu ferðafólk vilja koma til Føroya í háárstíðini, sum er summarið. Visit Faroe Islands arbeiðir miðvíst fyri, at ferðafólk eisini skulu koma til Føroya uttan fyri háárstíðina, tá trýstið á hotellini og náttúruna er minni.

Kanningar hjá Visit Faroe Islands vísa, at útlendsku ferðafólkini, sum vitja í Føroyum, eru sera væl nøgd við uppihaldið. Talan er yvirhøvur um væl upplýst fólk við hægri útbúgving og eini ársinntøku, sum liggur yvir meðal. Hesi fólkini leita eftir ferðamálum, sum eru øðrvísi.

„Okkara kanningar vísa, at 97 prosent av ferðafólkunum eru væl nøgd við uppihaldið, og 68 prosent kundu hugsað sær at komið aftur. 86 prosent halda, at náttúruupplivingar eru týdningarmiklar, og 72 prosent siga tað sama um mentanina," segði Súsanna Sørensen.

## NØKUR HJARTASUFF

Hon vísti tó eisini á nøkur hjartasuff, sum útlendsk ferðafólk hava. Eitt teirra var, at bátar og bussar taka ikki kort. Eitt annað var, at ferðaætlanin er heldur trupul at skilja, og eitt triðja var, at trupult er stundum at fáa kunning, tá seinkingar og avlýsingar eru.

„Hetta eru viðurskifti, sum Strandferðslan kann gera nakað við," vísti Súsanna Sørensen á.

Hon ásannaði, at veksur ferðavinnan nógv og skjótt, fer tað at krevja nógv av føroyingum, serliga fólki á smáplássunum. Føroyingar bera orð fyri at vera óvanliga gestablíðir, men ábendingar hava seinastu tíðina verið um, at gestablídnið og tolið eru ikki óavmarkað.

„Kanska skal okkara mál gerast, at vit føroyingar eisini um fimm ár skulu tíma at vera blíðir og taka ímóti ferðafólki," segði hon.



*Súsanna Sørensen, Visit Faroe Islands*



»Ein stór avbjóðing er, at flestu ferðafólk vilja koma til Føroya í háárstíðini, sum er summarið

# **Fleiri skip** mugu **endurnýggjast**

Í samband við 100 ára dagin hjá Strandferðsluni bílegði Strandferðslan eina støðulýsing av strandfaraskipunum frá Knud E. Hansen, skipaverkfrøðingum. Nýggjaru skipini stóðu seg væl í kanningini, men ein stór avbjóðing hjá Strandferðsluni er skipaaldur, vaksandi ferðafólkatal og strong altjóða krøv, ið stovnurin virkar undir




SMYRIL



*Teistin fær góð skoðsmál, men hevur eisini avbjóðingar*



## »Summi skip eru so gomul, at ábøtur eru neyðugar longu nú

Strandferðslan hevur í frágreiðingini hjá Knud E. Hansen fingið váttað tað, sum hon hevði varhugan av frammanundan. Fleiri skip í flotanum hava tørv á at verða endurnýggjað, so tey kunnu nøkta ferðafólka- og farmaflutningin, sum stovnurin sambært lóg hevur skyldu til at røkja.

Summi skip eru so gomul, at ábøtur eru neyðugar longu nú. Ein onnur avbjóðing er, at í háarstíð er kapasiteturin ov lítil. Um veturin eru ongir trupulleikar tí viðvíkjandi. Skal tørvurin verða nøktaður um summarið, krevjast eitt ella fleiri skip aftrat teimum, sum longu eru í flotanum.

Skipini, sum verða umrødd í støðulýsingini hjá Knud. E. Hansen, eru Smyril, Teistin, Ternan, Sam, Ritan og Sildberin.

### FLAGGSKIPIÐ SMYRIL

Smyril, sum er nýggjasta skipið, stendur seg best í støðulýsingini.

Skipið verður lýst sum eitt skip, ið er sera væl egnað til vanlig ferðafólk, rørslutarnað, persónbilar og tungan flutning. Skipið verður mett at vera sera tíðarhóskandi fyri manning og ferðafólk, og manøvrering og maskinarí rigga væl. Mett verður ikki, at trupulleikar verða við kapasitetinum í mong ár, hóast ferðafólka- og bilaflutningurin økist ár undan ári.

Strandferðslan hevur tó avbjóðingar við nýggjasta skipinum. M.a. er MLC-sátmálin nýliga komin í gildi, ið setir størri krøv til eitt nú hvíld hjá manningini. Hetta hevur við sær, at meiri manning krevst fyri at halda hvílitíðina, og tí vanta nú kømur til mannngina. Nøkur vórðu tikin burtur av hotellinum umborð, og har eru so færri kømur nú.

Størsta avbjóðingin við Smyrli er, at ongin dokk er í Føroyum, sum tekur hann. Tí má hann av landinum í dokk.

Ein onnur avbjóðing er, at skuldi okkurt hent við skipinum, er onki sjóvegis samband í Suðuroynna. Í 80-unum hevði Strandferðslan bæði Smyril og Teistan, sum kundu




*Sam er elsta skipið í flotanum*

avloysa hvønn annan, men Teistin er nú burtur. Tá Smyril skal í dokk, má avloysaraskip finnast. Torført er at finna eitt hóskandi avloysaraskip, serliga tí talan er um so stutt leigumál, at reiðarí hava lítlan áhuga at leiga skip út til endamálið.

## TEISTIN GÓÐ SKOÐSMÁL

Teistin er næstnýggjasta skipið í flotanum, og hann fær góð skoðsmál frá Knud E. Hansen. Hann verður mettur at vera væl egnaður til ferðafólk, persónbilar og tungar bilar. Hann er góður at manøvrera við, og maskinaríið er nýtt og framtíðartryggjað.

Alment kann góða skoðsmálið kanska undra, tí mangan hevur verið kjakast um, at bildekkið er ov lítið, og at bíðitíðin at sleppa yvirum er ov long. Hóast ongir trupulleikar eru við ferðafólkakapasitetinum, er veruleikin, at bildekkið er ov lítið til øktu ferðsluna. Fyri at loysa hesa avbjóðing hevur Strandferðslan saman við Alpha Travel ment eina nýggja bókingarskipan, ið verður roynd í løtuni. Kommunalpolitiskt hevur ikki verið undirtøka fyri at brúka skipanina úr Skopun, so har er gamla skipanin við vanligum røðum í gildi.

Manningarrúmini á Teistanum eru ov lítil, og eisini eru tey ov fá. Eins og á Smyrli er meira manning komin umborð orsakað av nýggjum krøvum. Strandferðslan hevur loyst hetta við at leiga hús í Skopun til manningina, og tey eru ein eyka útreiðsla.

Teistin verður eisini brúktur at sigla út í Hest, men fólk í Hesti vilja hava fleiri túrar, samstundis sum sandoyingar helst ikki vilja út í Hest á veg í Sandoynna. Trupult er eisini hjá einum so stórum skipi sum Teistanum at manøvrera í Hesti.

## TERNAN OV GOMUL

Í fleiri ár lá Ternan sum tiltaksskip við bryggju. Tá Másin legði árarnar inn av elli, varð Ritan flutt á Svínoyar- og

Fugloyar-leiðina av Nólsoyar-leiðini, og so vantaði eitt skip har. Tá varð gjørt av, at Ternan skuldi røkja leiðina. Skoðsmálini, ið Ternan fær frá Knud E. Hansen, eru alt annað enn góð. Staðfest verður, at hon allarhelst hevur sæð sínar bestu dagar.

Víst verður á, at orsakað av herdum krøvum og umbyggingum er skipið vorðið tyngri og tyngri. Frívektin er nú so lítil, at til ber ikki at flyta fleiri enn tveir tungar bilar. Tæringar eru eisini farnar at gera um seg. Knud E. Hansen vísir eisini á, at salongin er ótíðarhóskandi til ferðafólk. Hóast manningarrúm eru umbygd, eru tey enn undir dekki og myrk – og tí eisini ótíðarhóskandi.

Ein annar trupulleiki við gomlum skipum er, at tá okkurt ferst, er trupult og kostnaðarmikið at skaffa eykalutir, tí talan er um so gamlar eykalutir, at teir verða ikki framleiddir meira. Hetta var ein trupulleiki herfyri, tá eykalutir kravdust til Ternuna. Umvælingin tók alt ov langa tíð.

Ternan siglir hóast alt hetta trúliga aftur og fram millum Havnina og Nólsoy, og nú er ferðafólkatalið vaksið so nógv, at um sumrarnar sleppa bólkar ikki við ella mugu velja annan túr. Um veturin er trupulleikin, at skipið er heldur stórt at føra so lítið av ferðafólki, sum brúka skipið um veturin.

## SAM ER 43 ÁR

Sam gongur á 43. ári og roynist enn væl sum farmaskip, men fær vánalig ummæli sum ferðamannaskip. Hann verður skírdur ótíðarhóskandi til ferðafólk, og funnist verður at, at rørslutarnað ongar møguleikar hava at brúka skipið. Trupult er m.a. hjá rørslutarnaðum at brúka Sam, tí gáttin til og úr salongini eru ov høg. Eisini er myrkt og ov nógvur gangur í salongini frá maskinrúminum. Manningarrúmini eru eisini myrk og ótíðarhóskandi orsakað av gangi.

Ferðafólkatalið í Kalsoynna er nógv økt av Kópakonuni. Trongligt kann tí vera á bildekkinum, tí har eru ofta tríggjar røðir. Tá er trongligt bæði at fáa bilar og fólk í land. Ferðafólkatalið minkar ógvusliga, tá háárstíð ikki er. Tá er yvirkapasitetur á Sam, og hann megnar sera væl at



Manningin hevur sera vánaligar umstøður umborð «

Sildberin er frá 1994



nøkta tørvin á øllum flutningi í og úr Kalsoynni.

## ELSTA SKIPIÐ Í FLOTANUM

Ritan verður 50 ár í 2020, og hóast hon frá ferðafólki fær sera góð skoðsmál á Svínoyar- og Fugloyarleiðini, sæst aldurin væl aftur í støðumetingini. Tæringar eru farnar at gera um seg. Ritan fær tó góð skoðsmál, tá um manøvrering ræður, og umstøðurnar hjá ferðafólki eru á heilt góðari leið.

Knud E. Hansen heldur, at skipið als ikki er egnað at flyta rørslutarnað, bæði tí salongin er óegnað til tess, og tí sera trupult er at koma umborð. Eitt er, at skipið kann fáa skaða av brestast við bryggju. Eitt annað er, at fólk mugu passa sær løgir at loypa umborð. Vandin er, at tú loypur í skeivari løtu og dettur niðurímillum. Knud E. Hansen leggur afturat, at soleiðis hevur verið í mong ár á útoyggj.

Strandferðslan veit fullvæl, at umstøðurnar eru truplar á ávísum útoyggjum, og hevur tí umbygt dekkini og atkomumøguleikar á skipunum. Eisini hevur hon heitt á avvarðandi myndugleikar at bøta um umstøðurnar á ymsu plássunum.

## NÝGGJASTA KEYPIÐ

Sildberin er frá 1994, men er nýliga keyptur og umbygdur til Skúvoyarleiðina. Hóast hetta fær hann ikki góð skoðsmál og verður kallaður avmarkaður.

Nevnt verður tó, at skipið manøvrerar væl. Eisini verður nevnt, at umstøðurnar hjá ferðafólki eru góðar, men atkoman í Skúvoy er líka trupul sum í t.d. Fugloy. Ferðafólkatalið stendur ikki í vøkstri, so Knud E. Hansen metir, at Sildberin hevur nøktandi kapasitet at tæna Skúvoynni.

Hinvegin verður funnist at, at Sildberin lastar ikki meira enn eitt tons, og at manningin hevur sera vánaligar umstøður umborð. Strandferðslan hevur roynt at bøtt um manningarviðurskiftini við at seta skúr upp sum kontór á Sandi.

*Ternan fær ikki góð skoðsmál frá Knud E. Hansen*



# **Halda** er hugtikin av **bussum**

Tilvildin man mongum ráða, og soleiðis var eisini hjá Haldu Juul Olsen, tá hon valdi sær sítt lívsstarv hjá HK bussum, har hon nú hevur verið í 15 ár. HK bussar hava sáttmála við Strandferðsluna um at røkja fleiri bygdaleiðir í Sundalagnum, m.a. til Gjáar og Tjørnuvíkar





Tá rituvíkingurin Halda Juul Olsen fyri knapt 20 árum síðan var liðug við student og HH, fór hon ikki undir víðari lesnað sum so mong onnur. Í staðin fór hon at koyra Skálafjarðar-leiðina, sum tá var kommunal.

Koyringin tá var ikki nógv øðrvísi, enn hon er í dag, tí flestu ferðafólkini vóru eins og nú arbeiðsfólk og skúlabørn, men alskurin hjá Haldu til bussar var longu tá farin at spíra.

„Eg veit ikki, hvat tað er við bussum, men teir hava altíð hugtikið meg. Eg eri júst afturkomin úr Póllandi, har vit hava keypt ein flottan nýggjan buss til Bygdaleiðir. Tú mást koma aftur at vitja næsta ár, tá hann kemur," sigur Halda.

## »Fleiri stardu, tá tey sóu, at ein ung dama førdi stóra bussin

## HUGNI VIÐ LEIÐ 400

Longu sum 22 ára gomul fekk Halda møguleikan at koyra størstu bygdaleiðina, leið 400. Fleiri stardu, tá tey sóu, at ein ung dama førdi stóra bussin.

„Eg haldi ikki, at tey vildu mær nakað ilt, men tað var kanska eitt sindur óvanligt tá, at ein kona og enntá ein ung kona førdi ein so stóran buss," sigur Halda.

Tá Halda fór at koyra leið 400, koyrdi hon ikki til Klaksvíkar sum í dag, men til Dúgvuna á kaiini í Leirvík. Hesa tíðina minnist Halda sum eina hugnaliga tíð.

„Tað kom fyri, at vit stóðu og bíðaðu eftir Dúgvuni, og tá høvdu við tíð at práta, so eg vil siga, at hendan leiðin var meira sosial tá enn nú, tí nú heilsa vit mest sum bara upp á hvønn annan, tá vit hittast á vegnum. Eisini heilsi eg við gleði upp á fleiri, sum eg minnist pendlaðu dagliga ímillum Leirvík og Klaksvík," sigur hon.

Seinasta túrin hjá Dúgvuni minnist Halda sum eina serstaka hugnaliga løtu. Hon minnist eisini, at viðurskiftini vóru ikki so skipað tá sum í dag.

„Eitt nú høvdu vit onga ferðaætlan fingið fyri nýggju leiðina til Klaksvíkar, so vit koyrdu bara sum áður, har vit broyttu endastøðina frá Fuglafirði til Klaksvíkar. Næsti trupulleikin var, at vit ánaðu ikki, hvar vit skuldu steðga í Klaksvík," sigur Halda og flennir.

## ENDAÐI Í SUNDALAGNUM

So eru vit aftur, har vit byrjaðu, við tilvildina. Tí eftir eina stutta tíð í Danmark vendi Halda nøsina aftur til Føroya, og har vildi tilvildin tað soleiðis, at hon endaði í Sundalagnum.

*Halda Juul Olsen á skrivstovuni hjá HK bussum*




TR 017



„Busseigarar høvdu allarhelst fingið frænir av, at eg ætlaði mær heimaftur, so Hans Jákup Kollslíð ringdi og spurdi, um eg hevði hug at koyra hjá HK bussum, og eg tók av," sigur Halda.

Bussførarar skulu tíðliga upp á morgni at røkja ymsu leiðirnar, og onkrar morgnar var heldur illfýsið at koyra úr Rituvík, so tá Halda ein dagin sá eini hús í Sundalagnum, ið hon hevði ráð til, smekkaði hon til og fekk húsini. Í teimum býr hon enn.

Talan er kanska ikki um somu mongdir av ferðafólki sum á leið 400, men hon heldur tað vera áhugaverdari at koyra í Sundagnum enn við leið 400.

„Við leið 400 koyrir tú úr Havn til Klaksvíkar aftur og fram dagin langan, men her í Sundalagnum vitjar tú ymsar bygdir sum m.a. Gjógv og Tjørnuvík. Og hetta eru vakrar farleiðir at koyra hvønn dag, eisini fyri okkum, ið koyra dagliga," sigur hon og vísir á eina serstakliga vakra mynd, sum ein bussførari hevur lagt út á Facebook frá einum morguntúri í Tjørnuvík.

## BUSSUR Í IVAVEÐRI

Dagligu ferðafólkini eru fyri tað mesta tey somu sum við leið 400 á sinni, nevniliga arbeiðsfólk og skúlabørn. Halda hevur tó sum bussførari eisini merkt, at talið á útlendskum ferðafólkum er vaksið støðugt farnu árini.

„Tey koma allastaðni frá og eru í øllum aldursbólkum, og tey spyrja um alt frá, hvar tey kunnu eta, til nær bussurin kemur aftur eftir teimum," sigur Halda.

Ferðafólkini á hennara farleið vitja serliga Gjógv, Tjørnuvík og Slættaratind, men Halda ansar sera væl eftir teimum.

„Ferðafólkini vita ikki altíð, hvat tey koma til, so er mjørki niðan á Slættaratind, loyvi eg teimum ikki av har, men vísi teimum heldur onkra aðra loysn, sum t.d. at vitja gjónna við Gjógv," sigur hon avgjørd.

Ikki bara fyri ferðafólk er vandi á ferð av og á. Tvørligt kann eisini vera at koyra bussin, og ein morgun endaði galið hjá Haldu í Norðragøtu.

„Vit vóru ávegis niðan eina brekku, tað var hált og nógvur vindur, og eg stóð føst. Endin er so, at bussurin glíður og fýkur inn í eina autoverju," sigur Halda, men leggur dent á, at støðan ongantíð gjørdist hættislig.

Tó lærdi Halda av hesum tilburðinum, at tá vindferðin fer upp um eitt vist, verður ikki farið avstað. Hon saknar tó eina yvirskipaða leiðreglu um, nær bussar yvirhøvur skulu hætta sær millum bygdir.

„Eg eri als ikki bangin fyri at taka avgerð um, at í dag verður ikki koyrt vegna veður, men tað hevði onki





**»Tvørligt kann eisini vera at koyra bussin, og ein morgun endaði galið**

bilað, um vit høvdu eina almenna mannagongd, ið legði dent á, nær tað er óráðiligt at hætta sær ímillum bygdir."

## ÚR BUSSINUM Á KONTÓRIÐ

Í dag koyrir Halda ikki dagliga buss, men situr saman við stjóranum og passar HK bussar á kontórinum í Streymnesi. Hendan heldur ruskuta morgunin, vit vitja, gongur ikki long tíð, so ringir telefonin hjá Haldu. Tað skilst á lagnum, at Halda skal samskipa onkra koyring.

„Ja, tað er allarhelst rætt, at eg eri farin frá at vera bussførari til at vera samskipari," sigur hon.

HK bussar hava fyrst og fremst avtalu við Strandferðsluna um at røkja bygdaleiðirnar í Sundalagnum við trimum bussum, men tey eiga átta bussar tilsamans, og hinir verða leigaðir út til annað endamál. Telefonuppringingin var um eitt leigumál.

„Vit hava upplivað ein vøkstur ikki bara við fremmandum ferðafólkum, men eisini við vinnuferðandi, ið eru á ráðstevnum. Hesi skulu so koyrast til fundarvirksemi, sum ofta verður samansjóðað við útferðir," sigur Halda.

Halda letur væl at samstarvinum við Strandferðlsuna og heldur, at koma busseigarar við hugskotum ella viðmerkingum, verða tær tiknar væl upp. Hinvegin heldur hon, at ein ávísur ótryggleiki er í, at Bygdaleiðir skulu bjóðast út fimta hvørt ár.

„Í veruleikanum veit ein ikki, um ein hevur eitt felag ella eitt arbeiði, tá ein útbjóðing fer fram, so hetta skapar ikki júst tryggleika," sigur hon.

## SUNDALAGIÐ IKKI BLINDTARMUR

Arbeiðið er byrjað upp á nýggja Eysturoyartunnilin, sum eftir ætlan skal vera liðugur í 2021. Halda er ikki svartskygd um, at nú fer Sundalagið bara at gerast ein blindtarmur, tí nógva ferðslan úr Klaksvík og Eysturoy helst fer undir Skálafjørðin í staðin fyri ígjøgnum Sundalagið.

„Vit hava lesandi her í økinum, ið skulu bæði til Kambsdalar og til Glasir at lesa, so onkur loysn má vera til tey," sigur hon.

Tað hoyrist tó, at hon hevur grundað yvir hetta nýggja samfelagsmynstrið, tí hon hevur umhugsað ymsar loysnir.

„Ein loysn er, at leið 400 kann koyra, sum hon ger í dag, og taka tey lesandi við. So kundu klaksvíkingar skift á Skipanes-krossinum til Runavíkar-leiðina, sum kundi koyrt til Havnar. Skálafjarðar-leiðin kundi so koyrt kring Skálafjørðin, og upplagt er, at bussurin, sum koyrir á Strendur, heldur fram til Havnar," sigur hon.

# **Galaxy** royndist eftir umstøðunum **væl**

Í vár avloysti grikska ferjan Galaxy Smyril á Suðuroyar-leiðini. Eftirmetingin vísti, at av teimum 23 døgunum, Galaxy var í sigling, var ongin túrur avlýstur fyrstu 18 dagarnar. Síðstu fimm dagarnar vórðu sjey túrar avlýstir vegna eysturrætt, streym og metingina hjá manningini. Tilsamans ferðaðust 5.436 ferðafólk við Galaxy, og skipið flutti 1.834 bilar, 172 vørubilar og 71 lastbilar






# »Strandferðslan fegnast um, at samstarvið við griksku manningina var fyrimyndarliga gott

Galaxy avloysti Smyril í apríl og mai í ár. Tá skipið fór í sigling, høvdu fyrireikingarnar hjá Strandferðsluni at fáa fatur á einum hóskandi skipi fyri Smyril vart eitt heilt ár. Roynt varð fyrst at fáa Norrønu sum avloysaraskip, tí hon hevur fyrr roynst væl sum avloysaraskip, men hon var ikki tøk.

Yvirhøvur var trupult at finna avloysaraskip, tí sera fá skip eru góðkend at sigla við nógvum ferðafólki í Norðuratlantshavi, og fá reiðarí eru áhugað at leiga skip út so stutt tíðarskeið, sum Galaxy skuldi leigast.

Galaxy fekk góðkenning til at sigla við 400 ferðafólkum á Suðuroyarleiðini. Klassin góðkendi skipið, og tað gjørdu føroyskir myndugleikar eisini.

## SKIPARIN RÆÐUR

Manningin umborð var griksk, og føroyingar vóru við sum vegleiðarar. Avgerðarmyndugleikan umborð hevði grikski skiparin. Tá Galaxy eina ferð vendi við í høgari aldu, fekk skiparin ikki neyðugar upplýsingar um alduhædd av einum servara hjá Landsverki, sum var vorðin óvirkin.

Undir hesum umstøðunum gjørdi skiparin av trygdarorsøkum av at venda við, og hesum stuðlaði Strandferðslan honum í, tí umborð hevur skiparin evstu ábyrgdina.

Alment varð spurnartekn sett við, um trygdin altíð var í lagi umborð á Galaxy. Hesin ivi var ógrundaður. Trygdin var allatíðina í lagi.

„Fyriskipað varð umborð eftir teimum ásetingum, sum eftirlitini kravdu. Vóru tílík viðurskifti ikki í lagi, hevði Strandferðslan ikki góðkent, at skipið loysti, og tað høvdu avvarðandi myndugleikar heldur ikki,“ sigur Hilmar Eliasen, stjóri.

## GOTT SAMSTARV

Strandferðslan fegnast um, at samstarvið við griksku manningina var fyrimyndarliga gott, og at mong ferðafólk høvdu góðar upplivingar sum ferðandi við skipinum.

Í eftirmetingini ásannaði Strandferðslan, at skipið brúkti longri tíð at manøvrera enn Smyril. Minni tíð kundi verið brúkt, um manningin t.d. brúkti sleiparan hjá MEST, ið var tøkur at tilkalla. Tað valdi hon ikki. Lastingin tók eisini longri tíð. Hetta komst m.a. av, at minni pláss var á dekkinum enn á Smyrli.

Niðurstøðan hjá Strandferðsluni var, at Galaxy eftir umstøðunum royndist væl. Ivasamt er tó, um nakað skip kundi roynst líka væl sum Smyril, tí Smyril er serbygdur og serútgjørdur til at sigla í Norðuratlantshavi.

„Tá Smyril næstu ferð skal í dokk, kann væl henda, at boð verða send eftir Galaxy aftur, tí fá skip eru tøk til hesa sigling, ið eru so væl egnað sum Galaxy. Men vit fara helst at krevja, at manningin fer á simulatorskeið áðrenn, so túrarnir kunnu avgreiðast skjótari, og vit endurskoða eisini ferðaætlanina, so hon hóskar til skipið,“ sigur Hilmar Eliasen.

# Ferðslukort

Domestic network map




Lesið meira á www.ssl.fo




1917–2017
STRANDFARASKIP
LANDSINS




Travel all over the islands by bus and boat. Buy the TravelCard at the airport or at the terminal in Torshavn. For further information call 34 30 30.

**Enjoy the most beautiful bustrip in the world**




Mykines not included.
Children 7-15 years old half price.

STRANDFARASKIP LANDSINS

# The Public Transport Company of the Faroe Islands

Strandfaraskip Landsins (SSL) is a nationally owned transport company. The main objective for SSL is to provide transport to all corners of the Faroe Islands

SSL runs six ferries named Smyril, Teistin, Sam, Ritan, Sildberin and Ternan. All the ships are named after birds, and only Smyril, Teistin, Sam and Ternan are car ferries. The other ferries are passenger ferries only.

The ferry to Mykines is called Jósup. Jósup is privately owned as SSL has a contract with Sp/f Mykines for the route to Mykines. More info about this company can be found on www.mykines.fo.

SSL also runs multiple bus route which are all privately run by multiple Faroese bus companies.

The main office for SSL is situated on Suðuroy in the town Tvøroyri. The main ferry and bus terminal called Farstøðin is situated on the harbor in the capital Tórshavn.

SSL also runs three cargo stations situated in Krambatangi on Suðuroy, in Tórshavn next to Farstøðin and in Klaksvík.

Approximately 170 people are employed on our ferries, cargo departments, head office and route information.

Today we are under the Ministry of Transport and our minister is Mr. Henrik Old. More information about our ministry can be found on www.smr.fo.

## Contact us

You can contact us 24 hours a day every day of the year on *00298 343030*, where we will answer all your route questions. Furthermore you are always welcome to contact us by e-mail on *fyrisiting@ssl.fo*

### MAIN OFFICE

Sjógøta 5, Postbox 30
FO-810 Tvøroyri
Tel.: +298 343000
Fax: +298 343001
E-mail: fyrisiting@ssl.fo

*Opening hours*
Monday–Thursday 08:00–16:00
Friday 08:00–15:00

### ROUTE INFORMATION

Tel.: +298 343030
Fax: +298 343003
*Replies 24/7*

### TERMINAL

Tel.: +298 343030
Fax: +298 343003

*Opening hours*
Monday–Friday 08:00–16:00

### FREIGHT SERVICE

Tel.: +298 343000
Fax: +298 343001
E-mail: farmur@ssl.fo

*Opening hours*
Monday–Friday 08:00–16:00

# Hvat man hetta vera?

Fylg tølunum







# Finn veg

Hjálp bussinum at finna til steðgiplássi









# Finn 5 feilir





# Kanska tú veitst tað

**1. Nær doyði Winston Churchill?**
a. 1946
b. 1955
c. 1965

**2. Hvussu eitur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag**
a. Maud Wang Hansen
b. Vígdis Johannesen
c. Óluva í Gong

**3. Hvussu eitur høvuðsstaðurin í Ungarn**
a. Budapest
b. Bukarest
c. Sofia

**4. Hvat landsmaður var sangarin Tom Petty?**
a. Onglendingur
b. Skoti
c. Amerikanari

**5. Hvør skrivaði skaldsøguna „Rekamaðurin"?**
a. Heðin Brú
b. Jens Pauli Heinesen
c. Martin Joensen

**6. Nær telvaðu Bobby Fischer og Boris Spasskij í Reykjavík?**
a. 1968
b. 1970
c. 1972

**7. Hvør var fyrsti løgmaður undir heimastýrislógini?**
a. Kristian Djurhuus
b. Andrass Samuelsen
c. Hákun Djurhuus

**8. Nær var ÍF FM-vinnari í fótbólti?**
a. 1978
b. 1979
c. 1989

**9. Nær varð Sjóvinnubankin stovnaður?**
a. 1906
b. 1932
c. 1946

**10. Nær kom sangurin „Satisfaction" hjá Rolling Stones út?**
a. 1963
b. 1965
c. 1968

**SUDOKU 1**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | | 3 | | | 8 | | | |
| | | 7 | 4 | 9 | | | | |
| 8 | | 6 | 1 | | 7 | 4 | 3 | |
| | 1 | | 7 | 3 | | 9 | | |
| | 8 | | | 5 | | | 7 | |
| | | 2 | | 8 | 4 | | 6 | |
| | 6 | 5 | 3 | | 9 | 2 | | 8 |
| | | | | 4 | 2 | 6 | | |
| | | | 6 | | | 7 | | 9 |

**SUDOKU 2**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 5 | | 8 | 7 |
| | | 6 | | 7 | 8 | 2 | | |
| | 8 | | 1 | | 3 | | | 5 |
| 5 | | 2 | 6 | 3 | 7 | | | 9 |
| | | | 5 | | 2 | | | |
| 3 | | | 8 | 9 | 4 | 5 | | 2 |
| 8 | | | 7 | | 1 | | 5 | |
| | | 9 | 2 | 5 | | 3 | | |
| 6 | 7 | | 3 | | | | | |

Svar: 1. 1965 2. Vígdis Johannesen 3. Budapest 4. Amerikanari 5. Jens Pauli Heinesen 6. 1972 7. Andrass Samuelsen 8. 1979 9. 1932 10. 1965

# Góða ferð í Føroyum!

Føroyar eru bergtakandi, og við skipum, bussum og tyrlum kanst tú vitja nærum hvønn blett í oyggjunum. Úr Sumba til Fugloyar kanst tú njóta vakra náttúru og hitta fryntlig fólk á ferð um firðir og fjøll. Fólk hevur búleikast í Føroyum í meira enn 1000 ár, og støðugt er landið ment og útbygt, eisini farleiðirnar kring oyggjarnar. Vit binda Føroyar saman við okkara fjøltáttaða virksemi, og vit gera tað við eldhuga og gleði.

*Góða ferð í Føroyum!*

STRANDFARASKIP LANDSINS